Petrina livir við sklerosu

Petrina heldur, at tað var líka frætt, at hon var so ung, tá hon fekk staðfest sklerosu, tí hon heldur, at ein dugir betur at taka tað, tí ein er so ungur. Petrina var 22 ára gomul, tá sjúkan varð staðfest

34 ára gamla Petrina Venned úr Klaksvík fekk staðfest sklerosu fyri 12 árum síðani, og hóast hon hevur livað við hesi sjúkuni, sum eitt nú hevur við sær, at serliga hennara høgra síða ikki virkar, sum hon skal, so kennir hon seg ikki sjúka. Hon hevur altíð nóg mikið at gera, og har sum Petrina er, er altíð ferð á

SAMRØÐA
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
Petrina Venned gongur heldur løgið. Hon haltar og til tíðir vinglar hon eins og ein drukkin persónur ger, tá hann roynir at ganga. Men Petrina drekkur ikki, og munurin á henni og einum ávirkaðum persóni er, at hon kann ikki sova tað av sær aftur.

Petrina hevur sklerosu. Hesa sjúkuna fekk hon staðfesta í februar 1991, men sjálv sigur hon, at hon hevur drigist við hana langt áðrenn tað.

– Eg var 16 ára gomul, tá eg fekk tað fyrsta barnið, og tað byrjaði at blíva heilt galið stutt eftir. Eg trillaði nógv, hóast eg slettis ikki fekk gingið. Eg minnist væl, hvussu eg vinglaði, og slaturin gekk millum fólk, at eg drakk so illa. Tey hildu meg snøgt sagt vera fulla, greiðir Petrina frá.

Men long tíð skuldi ganga afturat, áðrenn nakað bleiv staðfest. Petrina og maðurin, Sigfríður, fingu ein son í 1988 og framvegis var ongin diagnosa sett. Ikki fyrr enn sonurin, Bárður, var um trý ára aldur, settu læknarnir orð á sjúkuna hjá Petrinu.

» Tú hevur sklerosu«

– Tað fyrsta, sum eg segði og hugsaði var, hvat er tað, sigur Petrina, sum tá var 22 ára gomul. Hon visti yvirhøvur ikki, hvat tað var, og túsund tankar fóru ígjøgnum høvdið á henni.

Læknarnir greiddu henni frá, so frætt sum til bar. Men sannleikin er tann, at hóast áralanga gransking, so vita læknar enn tann dag í dag ikki so nógv um sjúkuna.

Petrina dugir tó væl at greiða frá, hvat tað er, sum hendir við kroppinum hjá henni.

– Sklerosa er ein nervasjúka. Nervarnar blíva berar, greiðir hon frá og samanber tað við leidningar. Tá onki er uttaná, so eru teir skroypiligur og tola ikki nógv av. Spakuliga niðurbrýtur sjúkan nervarnar í einum menniskjakroppi, og tað gerst truplut hjá einum sjúklingi at flyta seg ella at brúka teir ymsu likamspartarnar.

Ikki sjúk

Petrina veit, at sjúkan kann fara at hava við sær, at hon má sita í koyristóli, men soleiðis sum hon er fyri í dag, so liggur tað fjart í huganum. Serliga hendan dagin, tá Sosialurin er á vitjan er hon væl fyri. Tað sást næstan ikki á henni, at tað feilar nakað. Men hon sigur, at dagarnir eru ójavnir. Onkrir verri enn aðrir.

– Eg hugsi ikki vanliga um, at eg havi sklerosu, og tað er heldur ikki nakað, sum vit dagliga tosa um her í heiminum hjá okkum. Eg havi góðtikið tað, at soleiðis er tað bara, og so royna vit at liva eftir besta førimuni og taka ein dag í senn, sigur hon. Hon leggur tó afturat, at um hon ikki hevði havt ein so góðan mann, so veit hon ikki, hvussu hon hevði verið vorðin í dag.

Petrina arbeiðir dagliga í varða verkstaðnum á Brekku. Hon er brúkari, og har fæst hon fyri tað mesta við at seyma.

– Eg havi onga útbúgving, og eg tími ikki í skúla. Mær dámar væl á verkstaðnum. Har er gott samanhald, ogvit hugna okkum, sigur Petrina, sum ikki er einasti brúkari av verkstaðnum, sum bert er rørslutarnað. Men hon ásannar, at hon ikki kann gera eitt og hvørt arbeiði, so hon er fegin um at hava eitt at fara til.

Hon verður skjótt móð, og høgra síða hjá henni virkar ikki líka væl sum vinstra. Um hon skal vaska gólv ein dag, so veit hon, at tað verður tað einasta, sum orka er til tann dagin.

– Um vit nú siga, at vit menniskju fáa ein fullan svartan sekk av orku til hvønn dag, so er hann nóg mikið hjá einum frísku persóni til ein heilan dag. Men hjá einum sklerosu sjúklingi, tømist sekkurin nógv skjótari, og ein verður skjótari troyttur, greiðir hon frá.

Tey, sum kenna Petrinu, vita, at hon ikki er ein kvinna, sum liggur á tí latu síðuni. Og hon letur heldur ikki sjúku sína standa í vegin fyri ætlanum, sum hon hevur. Hon veit, hvat hon kann og ikki. Og tískil heldur hon seg burtur frá tingum, sum hon veit, at hon ikki er før fyri, men harafturímóti gongur hon við lív og sál upp í tað, sum hon kann.

– Eg havi altíð planir, og tað heldur mær uppi, sigur hon.

Dóttir hennara, Charlotta, svam nógv fyrr, og tá var Petrina sera aktiv sum foreldur í svimjifelagnum Ægi.

Maðurin hevur róð alla ta tíð, tey hava verið saman, og heldur ikki har hevur hennara lutur ligið eftir.

Í ár rør maðurin tó ikki, men tað ger Petrina sjálv. Hon er róðurskvinna hjá old-girls manningini, sum rør við fimm-mannafarinum Tekla.

– Kappróður er gott fyri sálina. Vit eru sjey tilkomnar kvinnur, sum hava tað avbera stuttligt saman í bátinum, og samanhaldið er ótrúliga gott. Vit ætla okkum at rógva á Ólavsøku, sigur Petrina.

Hon leggur tó afturat, at um hinar ikki vóru so góðar við hana og hjálptu henni, so hevði tað helst verið truplut hjá henni at verið við.

– Tað er vanliga ongin trupulleiki at sleppa í bátin, men onkuntíð tørvar mær hjálp til at sleppa úraftur, men tað skal ikki farast øðrvísi við mær enn øðrum, bara tí eg havi hesa sjúkuna. Tað er púra vist, sigur Petrina avgjørd á málinum.

Fakta

Fakta um sklerosu:

- Sklerosa er ein nervasjúka
- Ongin tilburður varð skrásettur í Føroyum áðrenn seinna veraldarbardaga
- Tað er sera ójavnt, hvussu sjúkan loypir á, og hvussu tann einstaki sjúklingurin er fyri
- Ikki er greitt, hvørjum sjúkan kemur av

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Líggjas í Bø 65 ár

Hann æt Eli M(arkus) Sørensen til 1962, tá hann fekk sær navnabroyting til Líggjas í Bø. Hann er klaksvíkingur, men foreldrini vóru tilflytarar. Pápin, Eliesar Sørensen, var ættaður úr Fugloy, og mamman, Jóhanna Ísalina Justesen, kom av Viðareiði.

Líggjas er handilsútbúgvin, og í nøkur ár var hann stjóri á Samvinnufelagnum. Seinni fekk hann sær egið bókhaldsvirki og hevur tað framvegis.

Fyri einum 25 árum síðani stovnaði hann saman við Símun Paula Konoy teldufyritøkuna Com Data. Hendan fyritøkan hevur verið ein av teimum stóru av sínum slag í Føroyum. Nú er Olivur Thomsen stjóri á fyritøkuni.

Líggjas í Bø er eisini skald og gjørdi serliga nógv við skaldskap á yngri árum. Síðst í fimmti- og í sekstiárunum hevði hann yrkingar og umsetingar í 14. September og Framanum. Í 1964 gav felagið Oyggjaframi tað frálíka yrkingasavnið "Til lívið" út. Ein av teimum bestu yrkingunum er "Mold", sum byrjar við orðunum:

Tað eru menn í Føroyum
sum elska mold
hesa deiligu svørt
moldina…

Líggjas hevur ein góðan penn og hevur eisini skrivað nakrar stuttsøgur.

Í 1960 giftist hann við Oddvør Poulsen úr Mikladali, og tey fingu børnini Rógva 1961, Beintu 1963 og Unn 1976.

Eivind Niclasen 85

Mikudagin fylti Eivind Niclasen í Klaksvík 85 ár. Hann er føddur og uppvaksin í Sørvági, sonur Elisabeth og Óla Niclasen. Elisabeth var ættað úr Sørvági, meðan Óli var sunnan av Bø.

Bøur var bygd, sunnan fyri Kirkjubø, sum varð avtoftað fyri mongum árum síðan.

Eivind átti seks brøður og tvær systrar, av teimum livir bert yngsti beiggin, Hans David, eftir.

Í 1943 giftist hann við Elly úr Norðistovu í Klaksvík. Tey eiga børnini, Karolinu, Ólav og Ragnar.

Í nógv ár sigldi Eivind sum skipari og stýrimaður, til hann tók starvið í reiðarínum, Vesturvón, eftir beiggja sín Jóhannes, tá hann brádliga doyði í 1969.

rs

Dagurin

18. juli. Arnolphus, deyður í 641. Var bispur í Metz. Eftir deyða hansara hendu mong undurverk við grøv hansara, og hann varð skírdur halgimenni.

Ættarmót hjá eftirkomarunum á Høgabóli

24. mai 2003 høvdu eftirkomarar hjá Jóhonnu (1877-1947) og Símun Simonsen (1876-1974), á Høgabóli í Saltangará, ættarmót á Svangaskarði. Í hesum sambandi hevði ein av eftirkomarunum, Sverri Joensen, skrivað bókina "Á Høgabóli – Brot úr ættarsøguni"

Ovara røð: f.v. Óli Mittún Petersen, Egil Mittún Petersen, Símun Mittún Petersen, Marita Mittún Zachariassen, Hannilena Mittún, Páll Danielsen, Jóhanna Troest, Símun Danielsen
Mittasta røð: f.v Ása Linberg, Sverri Joensen, Elinborg Danielsen, Hálvdan Simonsen, Jógvan Simonsen, Jóhan Simonsen, Óli Simonsen, Marjun Nielsen.
Fremsta røð: f.v. Jónsvein Simonsen, Guðrun Rajani, Gunnvør Holm, Oddvør Jacobsen, Marna Petersen, Hjørdis Højgaard, Magnus Simonsen, Símun á Høgabóli

Einasta av børnunum hjá Jóhonnu og Símuni á Høgabóli, ið er eftir á lívi , er Malla (f. 1912), ið giftist við Klementi Petersen (1910-1988) av Selatrað

Kakukonan Belle



Nógv eru hugskotini og hugflogið er gott, tá tað ræður um at gleða børnini. Tá tú lesir hesi orðini, er vakra Belle ikki til longur; hon varð etin av átufreku gestunum hjá føðingardagsbarninum

KAKUKONUR OG MENN
Rúna Sivertsen

Bæði til barnaføðingardagar og aðrar veitslur er tað vorðið alt meiri vanligt, at gera kakur, sum síggja út sum konur ella menn, tok, bilar skip ella eitthvørt heilt annað.

Enntá kakur við mynd á, verða gleðiliga settar til lívs, og sjálvt ikki tey elskuligastu barnaeygu, seta okkum aftur, so matfegin at eta hvørja frøknu á svaðasvøri.

Føðingardagsbarnið elskar søguna um "The Beauty and the Beast", og nú hevur hon eisini roynt, hvussu Belle smakkar.

Køku-Belle er gjørd í Klaksvík - hon smakkaði avbera væl, sigst.